# Mælir til at játta peningin

**Landsstýrismaðurin í samferðslu fer at mæla landsstýrinum til játta pening so at eitt hóskandi skip kann leigast til suðuroyarsiglingina í vetur**



*– Sjálvsagt er talan um stórar upphæddir, men, men tað eru neyvan aðrir møguleikar, sum eru nøktandi,sigur Bjarni Djurholm.*

SUÐUROYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslu, sigur, at hann nú fer at mæla landsstýrinum til at játta strandferðsluni pening og at geva henni heimild at leiga eitt hóskandi skip til suðuroyarsiglingina í allan vetur, ímeðan Smyril verður lagdur.

Hann sigur eisini at talan skal vera um eitt skip, sum er í minsta lagi á sama støði sum Smyril er á.

Hann sigur, at er talan um eitt longri leigumál, sum tað her er talan um, er tað lættari at fáa eitt leigumál enn tað er, tá ið talan er um eitt stutt leigumál.

– Í so máta er tað ein fyrimunur at Smyril verður lagdur í fimm mánaðir, heldur enn í fýra vikur, sum tað upprunaliga var talan um, tí nú eru væl betri útlit fyri at tað eydnast at útvega eitt hóskandi avloysaraskip. Hann veit ikki, hvat tað fer at kosta at leiga eitt skip so leingi. Men hann vísir á, at tað varð mett at kosta 6,3 milliónir at leiga eitt skip í hálvan annan til tveir mánaðir, sum tann upprunaliga umvælingin varð mett at kosta. Nú skal skipið so leigast í einar fimm mánaðir, men á ið talan er um so langt leigumál, verður prísurin um dagin helst lægri.

– Sjálvsagt er talan um stórar upphæddir, men, men tað eru neyvan aðrir møguleikar, sum eru nøktandi, sigur Bjarni Djurholm.

Løgmaður um dystin millum Ongland og Brasilia:

# Ongland fer at vinna

**– við einum høvdara frá Sol Cambell**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jan Müller*

Nú hvørki Føroyar ella Danmark ella annað norðurland er við í endaspurtinum í heimsmeistarakappingini í fótbólti velja nógvir føroyingar at halda við antin grannatjóðini Onglandi ella við fótbóltssnillingunum úr Brasilia. Millum teir mongu føroyingar, sum fara at sita frammanfyri sjónvarpsskíggjan fríggjamorgunin er møguliga eisini Føroya løgmaður, Anfinnur Kallsberg. Umframt at hann hevur sítt favorittlið, so hevur hann eisini boð uppá ein vinnara í hesum so avgerandi dystinum, har tvær av heimsins bestu fótbóltstjóðin bresta saman.

Løgmaður kemur ikki júst undir kategoriina fótbóltsidiot ella fótbóltsfreak. Honum dámar væl at síggja ein góðan dyst og sær í minsta lagi allar samandráttirnar av HM-dystunum. – Eg eri tó ikki so engageraður, at eg fari upp undir loftið, um eitt ávíst lið vinnur ella gravi meg undir gólvteppið, um eitt lið tapir. Men mær dámar góðan fótbólt, tí tað er gott undirhald og eitt frægd fyri eygað.

Loynidómurin aftanfyri hesi orð er kanska hann, at favorittliðið hjá løgmanni er einki minni enn Manchester United í bretsku kappingini.

Hetta er so kanska eisini ein av orsøkunum til, at løgmaður ikki bara heldur við Onglandi fríggjamorgunin men eisini heldur, at liðið hjá Beckham og Owen fer at vinna. – Eg rokni við, at tað verður ein av hesum listarligu avleveringunum við tí gylta fótinum hjá Beckham, sum fer at avgera dystin. Løgmaður heldur, at maðurin, sum fer at skora avgerandi málið verður Sol Cambell, sum er sera góður í deyðbóltsstøðum, og tað verður ein høvdari frá honum eftir ein góða avlevering frá Beckham, sum fer at geva bretum sigursmálið og harvið eitt lop nærri HM-heitinum.

Løgmaður undirmetir tó ikki sera dugnaligu og individuellu spælararnar úr Brasilia. – Men eg haldi, at verjan hjá Brasilia ikki altíð er so tøtt, sum hon eigur at vera í so avgerandi dystum.

Anfinn Kallsberg er annars ikki heilt ókendur á fótbóltsvølli sjálvur, hóast tað eru nøkur ár síðani hann var virkin spælari. Hann var í 1962 við til at vinna dreingjaliðnum hjá KÍ føroyameistaraheiti, sum miðvallarleikari. Dysturin millum fótbóltsrisarnar Ongland og Brasilia verður klokkan 7.30 fríggjamorgun og fer SvF at senda dystin beinleiðis.











# Høllin í Hoyvík nógv seinkað

**Upprunaliga skuldi høllin í Hoyvík verið klár at taka í nýtslu í november mánað, men nú verður hon ikki tikin í nýtslu fyrr enn eftir summarfrítíðina. Orsøkirnar eru m.a., at betongelement fingu skaða undir flutningi, og lekar í takinum høvdu við sær, at gólvið ikki kundi leggjast á til tíðina**



*Byggingin av ítróttarhøllini í Hoyvík hevur verið nógv seinkað, men nú røkist endiliga fyri, at hon kann takast í nýtslu eftir summarfrítíðina*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

ÍTRÓTTARHØLL
*Stefan í Skorini*

Ítróttarhøllin í Hoyvík, sum Tórshavnar Kommuna hevur latið bygt hevur verið í tungum sjógvi, síðan byggingin fór í gongd. Fyrst varð býráðið drigið í Føroya Rætt fyri ikki at lata K.J. Smíð arbeiðið, hóast fyritøkan hevði lægsta tilboðið, og nú er høllin seinkað meira enn eitt hálvt ár.

Høllin í Hoyvík verður tikin í nýtslu beint eftir summarfrítíðina, og tá er hon heilt klár, upplýsir Heðin Mortensen, formaður í bygginevndini fyri høllina í Hoyvík. Hann sigur víðari, at byggingin av høllini hevur verið nógv seinkað, og at fleiri orsøkir eru til tess.

Ein av orsøkunum er, at nøkur betongelement, sum skuldu setast upp í Føroyum, fingu skaða umborð á farmaskipinum, ið flutti tey úr Danmark til Føroyar. Hetta hevði við sær, at arbeiðsmenninir máttu bíða eftir nýggjum elementum, og hetta seinkaði arbeiðnum nakrar mánaðir.

Ein onnur orsøk er, at lekar í takinum høvdu við sær, at gólvið í høllini ikki kundi leggjast á til tíðina. Serkønir menn úr Danmark vóru komnir upp at leggja gólvið, men hetta bar ikki til, tí takið lak so illa. Teir máttu tí fara avstað aftur uttan at hava lagt gólvið.

**Óvist við avleiðingum**

Heðin Mortensen veit enn ikki, um seinkingin fer at fáa avleiðingar fyri Byggitek ella onnur, sum hava verið við í byggingini.

– Tað er nakað, sum vit taka støðu til, tá alt er liðugt. Tá vit hava fingið nærri frágreiðingar um seinkingina taka vit støðu í tí málinum, sigur Heðin Mortensen. Tað kann koma uppá tal, at kommunan fer at fáa ein part av dagpengunum aftur.

Nú er gólvið so endiliga lagt á, og høllin er at kalla liðug. Eftir er at asfaltera kring høllina og aðrir snøklar skulu eisini gerast.

Økið, sum høllin stendur á, var fyrr nýtt til skúlagarð, og tí skal kommunan gera nýggjan skúlagarð til Hoyvíkar skúla, og hesin verður klárur til eftir summarfrítíðina.

Samlaði kostnaðurin av høllini verður 12-13 milliónir krónur, og Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at tann upprunaliga kostnaðarmetingin hevur verið á leið røtt.

Útbjóðing av ítróttarhøll:

# Dómur skotin inn fyri Landsrættin

**Herfyri fekk byggifelagið K.J. Smíð úr Vestmanna viðhald í Føroya Rætti, tá felagið kravdi Tórshavnar kommunu eftir endurgjaldi, tí tað ikki fekk arbeiðið at byggja høllina í Hoyvík, hóast K.J. Smíð hevði lægsta tilboðið. Kommunan hevur skotið dómin inn fyri Landsrættin**



*K.J. Smíð fekk ikki arbeiðið at gera høllina í Hoyvík, hóast felagið hevði lægsta tilboðið. Felagið fekk viðhald í Føroya Rætti, men kommunan hevur skotið dómin inn fyri Landsrættin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

BYGGING
*Stefan í Skorini*

Stríðið um ítróttarhøllina í Hoyvík heldur fram. K.J. Smíð fekk viðhald í Føroya Rætti, men Tórshavnar býráð hevur skotið dómin inn fyri Landsrættin.

K.J. Smíð kravdi kommununi eftir endurgjaldi, tí hon ikki hevði givið felagnum arbeiðið at byggja høllina í Hoyvík, hóast K.J. Smíð hevði lægsta tilboðið. Ístaðin fekk Byggitek arbeiðið.

Grundgevingin hjá býráðnum fyri ikki at geva felagnum arbeiðið var, at K.J. Smíð ikki var limur í Føroya Handverksmeistarafelag. Hesum vildi K.J. Smíð ikki lata sær lynda og saksøkti tí kommununa.

Føroya Rættur metti, at grundgevingin hjá kommununi ikki var nóg góð, og tí skal K.J. Smíð hava endurgjald. Enn er ikki gjørt av, hvussu stórt endurgjaldið skal vera, men talan kann vera um einar 700.000 krónur.

**Fara víðari við málinum**

Jógvan Páll Lassen, advokatur hjá býráðnum, váttar, at farið verður víðari við málinum, og at dómarun verður skotin inn fyri Landsrættin.

Býráðið vil vera við, at tað hevur rætt til at velja og vraka millum innkomin tilboð, júst sum tí lystir. Tí kann býráðið velja ein arbeiðsgevara framum ein annan, hóast hann hevur eitt hægri tilboð.

Jógvan Páll Lassen vísir á, at dómurin sigur, at sambært lisitationslógini kann býráðið velja og vraka millum innkomin tilboð.

Dómurin sigur, at býráðið skal viðurkenna, at avgerðin um at vrakað tilboðið frá K.J. Smíð er ógildug, og at býráðið skal rinda K.J. Smíð endurgjald. Hvussu stórt endurgjaldið skal vera verður avgjørt 6. august í ár.